

www.oljan.fo

**Jan Müller** 26 - 12 - 2011

# Arabo um boring í 2012 - Vóna tað besta

Vit vóna tað besta og eiga at verða til reiðar, um olju og gass finst í rakstrarverdum nøgdum í Føroyum komandi ár. Hinvegin eigur man at planleggja sum um, at vit ikki finna olju og gass í rakstrarverdum nøgdum. Tað er hóast alt tað mest sannlíka útfallið reint statistiskt, segði Ben Arabo, stjóri í Atlantic Petroleum, tá hann helt røðu á Vinnuháskúlanum í farnu viku. Flestu brunnar turrir Ben Arabo segði m.a. - Tað at leitað verður eftir olju við Føroyar er sjálvandi spennandi, og kann hava stóra ávirkan á samfelagið, um so er at olja ella gass verður funnið. Tó er tað soleiðis, at flestu leitibrunnarnir, sum verða boraðir eru turrir. Tað hava vit sæð higartil í Føroyum teir hava í hvussu so er ikki havt olju í rakstrarverdum nøgdum. Hetta skulu vit hava í huga, tá tað aftur verður lagt til brots við einari leitiboring næsta vár ella næsta summar. Henda boringin verður framd av Statoil við ExxonMobil og okkum Atlantic Petroleum sum partnarar. Vóna tað besta Vit vóna tað besta og eiga at verða til reiðar, um olju og gass finst í rakstrarverdum nøgdum í Føroyum. Tìbetur er tað soleiðis, at ein útbygging tekur ár, og tí hevur man eitt sindur av tíð at fyrireika seg í, um tað skuldi hent, at olja ella gass fanst í rakstrarverdum nøgdum í føroyskum øki. Hinvegin eigur man at planleggja sum um, at vit ikki finna olju og gass í rakstrarverdum nøgdum. Tað er hóast alt tað mest sannlíka útfallið reint statistiskt. Ein leitibrunnur vestan fyri Hetland hevur kanska ein út av fimm kjans at finna olju ella gass.